## Renna niðan á Húsafelli

Í sambandi við seinsummardagin í Sandavági í morgin, verður fjallarenning niðan á Húsafelli, har farið verður frá SÍF-húsinum kl. 14. Fjallarenning hevur verið á hvørjum ári síðan 2004. Hjá royndum fólki í hampiliga góðari venjing, tekur tað góðar 40 minuttir at koma niðan á fjalli og omanaftur. Tilmelding verður gjørd á staðnum.



## Seint summar í Sandavági

Í morgin skipar SÍF í Sandavági fyri seinsummardegi. Eitt av tiltøkunum er tað vælumtókta sølutorgið. Í fleiri ár hevur Sandavágs Ítróttarfelag skipað soleiðis fyri, at fólk kunna leiga borð frá felagnum fyri sámiligan prís. Fólk kunna selja tað teimum lystir. Er tað onkur, sum eigur eina sofu, okkurt koppastell ella ov nógvar leikur, kunna tær seljast í Sandavági leygardagin. Lagt kann verða aftrat, at tað er ókeypis at koyra gjøgnum Vágatunnilin.

# sunds kommunu

sambýli í Svínoy ella kanska til umsitingararbeiði í teirri stóru Norðoya Kommunu.

Hesi fólkini vilja heldur hava, at peningurin skal í umfar í Hvannasundi, til dømis til gerð av barnagarði og øðrum tænastum, sum bygdarfólkið kann fáa gagn og gleði av í framtíðini. Hinvegin vísa tey á, at soleingi sum peningurin stendur á bók, ger hann onga nyttu!

- Nei, eg vænti at fara vit undir Klaksvík, so missa vit okkum sjálvi burtur. Tá verður tað lítlibeiggi ímóti stórabeiggja. Tá verða tað vit, 500 fólkini her norðuri ímóti teimum 5000 í Klaksvík.

- Og tað dugir ein og hvør at skilja, at her koma vit ikki at formáa okkum nakað sum helst, sigur ein kvinna, sum er farin til handils at keypa.



- Eg veit, at nógv fólk eru ímóti at leggja saman við Klaksvík. Men eg ivist onga løtu í, at tá tey eru vorðin kunnað um allar fyrimunirnar, so fara tey helst at broyta hugsan, sigur Pól Fuglø, næstformaður í Hvannasunds kommunu. Hann er íðin talsmaður fyri hesi samanleggingini

### Dyrgt við góðum agni

Í Hvannasunds kommunu finnast eisini tey fólkini, sum halda at klaksvíkingar hava havt gott agn og hava dugað ómetaliga væl at dyrgja fyri ætlaðu samanleggingini.

- Tað tykist, sum um teir hava lokkað við øllum møguligum. Men hygg bara eftir hinum smærru bygdunum, sum eru komnar upp í Klaksvík: Tær hava fingið sera lítið burtur úr, og hava ikki havt tað lætt í samstarvinum.

- Hetta átti okkara bygdaráð at kunna sæð: Tað verður einvegis ferðsla til Klaksvík, tí her verður so einki gjørt, sigur ein ungur bilførari.

Hann vísir á, at bygdirnar Árnafjørður og Norðoyri hava havt sítt stríð við ta størru kommununa fyri at fáa nakað at henda, og hava nýtt nógv orku í at fáa bara ein lyktapela settan upp ella ein gonguteig fram við vegnum

Og at enda leggur hann aftrat: - Vit her norðuri fara so einki at fáa frá teimum!

### Mugu uppí

Í bygdini eru sjálvandi tey sum eru fyri at leggja báðar kommunurnar saman.

Teirra støða er, at ein so lítil kommuna við undir 500 íbúgvum ikki megnar at svara øllum teimum krøvunum sum landsins myndugleikar hava lagt og fara at leggja út á kommunurnar.

- Sohvørt sum uppgávur verða lagdar út til okkum, og vit ikki megna at gjalda fyri tað, so merkir tað aftur at tænastan í okkara kommunu verður verri.

- Og hví ikki leggja saman sjálvboðið, enn at koma á knøunum og biðja um at sleppa í part í Norðoya Kommunu? Nú standa vit munandi sterkari, tí vit kunnu samráðast um ein sáttmála, heldur enn at verða tvingað saman, sigur ein maður, sum er farin oman á havnarlagið til eitt prát.

Teirra sjónarmið er eisini tað, at eingin orsøk er at óttast fyri, at tær 10-11 milliónirnar, sum kommunan eigur á bók, enda í tí stóra kommunukassanum í Norðoya Kommunu.

- Eg trúgvi at okkara bygdaráð, hóast tey eru ósamd og tykjast at dáma best at klandrast um smámál, kunnu samráða seg til eina skilagóða avtalu, sigur ein annar.

Ein triði heldur, at peningurin á teirri so navnframu bókini, kann verða settur í ein serstakan »Hvannasundsgrunnn« til at menna hesa kommununa.

- Hetta er ikki roynt áður, men hví kunnu vit ikki verða fyrstir at royna eina slíka loysn?, spyr hann.

### NEI

Felags fyri tey sum eru ímóti, er júst óttin fyri, at Klaksvík skal fara avstað við øllum hesum pengunum, og tja, - kanska bara brúkar tær aðrastaðni enn í Hvannasundi – til dømis at asfaltera í Klaksvík, gerð av eldrasambýli í Svínoy ella kanska til umsitingararbeiði í teirri stóru Norðoya Kommunu

### JA

Hví ikki leggja saman sjálvboðið, enn at koma á knøunum og biðja um at sleppa í part í Norðoya Kommunu? Nú standa vit munandi sterkari, tí vit kunnu samráðast um ein sáttmála, heldur enn at verða tvingað saman

# Altjóða mótasýning í SMS

**Fríggjadagin verða tvær nýskapandi og spennandi mótasýningar í SMS, har tað nýggjasta til heystar verður víst fram í eini heilstoyptari mótauppliving**

MÓTASÝNING
*Tíðindaskriv*

Torgið í SMS er umgjørt til ein forvitnisligan mótapall til sýningarnar, sum verða klokkan 17 og 21.30 fríggjakvøldið. Allir mótahandlarnir í SMS luttaka við tí nýggjasta og mest forvitnisliga í handlinum.

### Áhugaverd Catwalk

Áskoðararnir skulu vænta sær eina mótauppliving, har ikki bara klæðini eru í serflokki. Tað vera fleiri av teimum bestu og royndastu modellunum í Føroyum, sum trína fram um tjaldið fríggjadagin, men afturat ganga eisini onkur kend og áhugaverd andlit. Um 100 sett verða víst fram teir 45 minuttirnar mótasýningin varir.

### Gunnvá Patursson roynir at flyta mørk

Hetta er triðju ferð, at Gunnvá Patursson skipar fyri einari mótasýning í SMS. Hvørja ferð hevur hon givið áskoðarunum eina serliga uppliving, men hesar vera nakað heilt serligt lovar hon.

Hon vil avdúka sum minst um mótasýningarnar, tí at tað er ein partur av upplivingini, at tú ikki veit, hvat ið fer at henda. Men so mikið vil hon siga, at mørk verða flutt fríggjadagin og at áskoðararnir skulu vænta sær eina góða og øðrvísi heildaruppliving. Tað verður mótasýning, men stórur dentur er lagdur á at tað skal vera eitt show.

- Tú kanst gott skriva, at onkur verður kløkkur og at tónleikurin verður hart frá, leggur hon afturat.

### SMS er opið

Samstundis sum at mótasýningin setur dám á fríggjadagin, so er eisini hugsað um, at áskoðararnir skulu hava møguleika at ogna sær tað tey síggja á pallinum. Allir handlarnir í SMS hava opið til klokkan 23 fríggjakvøldið.